# Kostfakligt starvsfólk til Klaksvíkar Sjúkrahús

Klaksvíkar Sjúkrahús søkir eftir einum dugnaligum og arbeiðssomum kostfakligum starvsfólki, sum brennur fyri at gera ein mun fyri føðslustøðuna hjá sjúklingum/ borgarum, saman við kostfakligum og tvørfakligum starvsfeløgum.
Starvið er eitt fulltíðarstarv frá 1. mei 2021 ella eftir avtalu.

**Arbeiðsuppgávur og ábyrgd:**

- Hava fokus á mat og máltíðir hjá sjúklingum/ borgarum, við vón um betri at røkka tørvin hjá tí einstaka.
  Tað er sera týdningarmikið, at sjúklingar/ borgarar fáa eina góða uppliving til hvørja máltíð.
- Vera bindilið millum køk og sjúklingadeild og harvið tryggja eitt gott og tvørfakligt stamstarv um matin.

Fyri at røkka hesum, skal starvsfólkið vera við til at borðreiða matin og ráðgeva sjúklingum/borgarum, avvarandi og starvsfeløgum. Starvsfólkið skal hava ábyrgd av at menna tilfar og mannagongdir í samband við matin, bæði í køkinum og á sjúklingadeildini.

**Førleikar:**

- tú ert yrkisbachelor í føðslu og heilsu
- tú hevur holla vitan og kunnleika um mat og føðslu
- tú dugir væl at samskifta í skrift og talu
- tú hevur hollan KT-førleika
- praktiskar arbeiðsroyndir frá stovnskøki kann vera ein fyrimunur

**Persónligir eginleikar:**

- tú ert tænastusinnað/-ur og fyrikomandi
- tú dugir at lurta, reflektera og taka skilagóðar fakligar avgerðir
- tú ert álítandi og ábyrgdarfull/-ur
- tú sært møguleikar framum forðingar
- tú ert samstarvssinnað/ur og jalig/-ur
- tú ert fleksibul og tolir broytingar
- tú hevur ein hugburð, sum stuðlar undir góðum trivnaði og arbeiðsumhvørvi

Vit bjóða ein fakligan spennandi gerandisdag saman við dugnaligum og fittum starvsfeløgum, har tú kanst fáa ávirkan á menningina av tænastuni hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Eisini bjóða vit eitt arbeiðspláss, har tað er vítt til veggja og rúmd fyri nýhugsan og nýskapan.

**Løn og setanartreytir** smb. sáttmálanum millum Kost- og føðslufelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at venda sær til Elisabeth Akursmørk, leiðara í køkinum, á telefon 404581/

229229 ella á teldupostadressu: elisabethak@ks.fo

**Umsóknarfreistin** er 01. mars 2021

**Umsókn við CV og prógvum skal sendast við telduposti til: umsokn@ks.fo**

Á okkara heimasíðu www.ks.fo kanst tú lesa um Klaksvíkar Sjúkrahús.

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
FO-700 Klaksvík
Tel: ( 00 298 ) 45 45 45 Fax: ( 00 298 ) 45 73 63